# Vágs kommuna

## Ársroknskapur 2016

**Frumrit**

Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um kommununa v.m. | 3 |
| Roknskaparátekning | 4 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 5 – 6 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara viðvíkjandi mánaðarliga innrapporteraðum tølum | 7 |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 – 9 |
| Høvuðsyvirlit | 10 |
| Fíggjarstøða | 11 |
| Játtanir og roknskapur | 12 - 16 |
| Sundurgreinað ætlan | 17 - 46 |
| Veðhaldskyldur v.m. | 47 |

## Kommunan

Vágs kommuna
Vágsvegur 30
FO-900 Vágur
Telefon: +298 663000
Telefax: +298 239301
Heimasíða: www.vagur.fo
Email: vagur@vagur.fo
Roknskaparár: 1. januar – 31. desember

## Býráðið

Dennis Holm, borgarstjóri
Eydis Kjærbo, varaborgarstjóri
Kirstin Strøm Bech
Dánjal Bjarkhamar
Erhard Joensen
Conrad Gaard Joensen
Eyðbritt Krosslá
Levi Mørk
Anna B. Samuelsen

## Fíggjarnevnd

Dennis Holm, formaður
Eydis Kjærbo
Anna B. Samuelsen

## Grannskoðan

NUMO
Løggilt grannskoðanarvirki

Býráðið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2016 hjá Vágs kommunu.

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin vísir ársins inntøkur, útreiðslur og løgur eins og ognir og skyldur hin 31. desember 2016.

Vágur, tann 1. juni 2017

**Í býráðnum:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm<br>*Borgarstjóri* | Eydis Kjærbo<br>*Varaborgarstjóri* | Kirstin Strøm Bech |
| Dánjal Bjarkhamar | Erhard Joensen | Conrad Gaard Joensen |
| Eydbritt Krosslá | Levi Mørk | Anna B. Samuelsen |

***Til býráðið í Vágs kommunu***

Vit hava grannkoðað ársroknskapin hjá Vágs kommunu fyri roknskaparárið 01.01.16 – 31.12.16 við nýttum roknskaparhátti, høvuðsyvirliti, fíggjarstøðu, játtanum og roknskapum, sundurgreinaðari ætlan og veðhaldsskyldum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl.". Ætlanartølini eru ikki fevnd av okkara grannskoðan.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við "Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl.". Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlógini. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at kommunan kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rætta mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin hjá Vágs kommunu gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skyldum fíggjarárslok 31. desember 2016 samsvarandi "Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl.".

**Supplerandi upplýsingar viðvíkjandi viðurskiftum í ársroknskapinum**

Uttan at hetta ávirkar okkara niðurstøðu skulu við vísa til upplýsingarnar á síðu 47 undir "aðrar møguligar skyldur", har kommunan vísir á, at tað í løtuni er ógreitt, um sjálvsognarstovnarnir Pálshøll og Marghøll skulu innganga heilt í roknskapin hjá kommununi. Kommunan hevur í árinum útreiðsluført stuðul til Pálshøll og Marghøll sum stuðulsútreiðslu. Av tí at tað enn er óvissa um niðurstøðuna hesum viðvíkjandi, hevur kommunan ikki innroknað ognir og skyldur í roknskapin. Kommunan er í løtuni í samskifti við Fíggjarmálaráðið við hetta.

Tórshavn, tann 1. juni 2017

**NUMO, Løggilt grannskoðanarvirki Sp/f**

Jørmann Petersen
*statsaut. revisor*

***Til Fíggjarmálaráðið***

Vit hava sum fyriskrivað í grein 10, stk. 7 í "Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl." gjørt tey arbeiði, sum eru lýst niðanfyri viðvíkjandi eftirkannan av, um mánaðarligu innrapporteraðu tølini fyri 2016 hjá Vágs kommunu til Fíggjarmálaráðið eru í tráð við skrásetingina hjá kommununi.

Okkara arbeiði er gjørt samsvarandi altjóða standardinum um avtalað arbeiði viðvíkjandi roknskaparligum upplýsingum, og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni.

Arbeiðið er einans gjørt við tí endamáli at geva eina váttan til Fíggjarmálaráðið um, at innrapporteraðu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi.

**Gjørt arbeiði**

Vit hava kannað eftir, at innrapporteraðu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøki tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi. Hetta er gjørt við at samanbera tølini í fíggjarskipanini hjá kommununi fyri einstøku tíðarskeiðini við innrapporteraðu tølini. Arbeiðið hevur ikki givið orsøk til viðmerkingar.

Grundað á at omanfyri nevnda arbeiðið hvørki er grannskoðan ellan gjøgnumgongd samsvarandi altjóða standardir um grannskoðan ella gjøgnumgongd og øðrum krøvum í føroysku lóggávuni, geva vit ikki nakra váttan við vissu um innrapporteraðu mánaðarligu tølini.

Um vit høvdu framt onnur arbeiði, grannskoðað ella gjøgnumgingið sambært altjóða standardum um grannskoðan ella gjøgnumgongd og eftir øðrum krøvum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, kundu onnur viðurskifti verið funnin og fráboðað tykkum.

Okkara váttan er einans gjørd við tí endamáli, sum er nærri lýst omanfyri til nýtslu hjá Fíggjarmálaráðnum, og má ikki nýtast til annað endamál. Váttanin fevnir einans um tey viðurskifti, sum eru nevnd omanfyri.

Tórshavn, tann 1. juni 2017

**NUMO, Løggilt grannskoðanarvirki Sp/f**

Jórmann Petersen
*statsaut. revisor*

## ALMENT

Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.tíl.". Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til seinasta roknskaparár.

Upphæddir í høvuðsyvirliti, fíggjarstøðu, játtanum og roknskapum, og sundurgreinað ætlan verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og máting

Útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá tær eru latnar. Í teimum førum, tá útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum og tænastuveitingum, verða hesar skrásettar so skjótt, upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá goldið verður.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma kommununi til góðar, og virðið av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað til kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri. Støðisognir verða tó ikki innroknaðar í fíggjarstøðuna, men verða førdar beinleiðis yvir rakstrar- og løguroknskapin.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA OG TRYGDARDISPOSITIÓNIR

Ársroknskapurin er gjørdur í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar til tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur ella -tap, verður tikið við í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Íløgur, sum eru gjørdar í fremmandum gjaldoyra, verða umroknaðar til kursin tann dagin, ognin er keypt.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Inntøkur

Inntøkur við sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um veiting er farin fram, og keyparin hevur yvirtikið váðan í roknskaparárinum. Skattainntøkan verður inntøkuførd, so hvørt sum avrokningin frá Føroya Gjaldstovu fyriliggur, og skattauppgerðin fyri desembur verður eisini tikin við í tí árinum, hon hoyrir til. Endaliga ársuppgerðin fyri skattainntøkuna kemur um heystið árið eftir, og sostatt verður tann reguleringin tikin við í komandi ársroknskapi.

### Útreiðslur

Útreiðslur, sum eru nýttar og gjørdar í árinum, verða tiknar við í roknskapin sama árið. Studningar v.m. hoyrandi til útreiðslurnar verða somuleiðis inntøkuførdir sama árið, sum útreiðslan fer fram, um hetta er gjørligt.

### Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og –tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur. Fíggjarinntøkur og fíggjarútreiðslur verða upptiknar við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

## LØGUR

### Støðisognir

Íløgur í støðisognir verða førdar beinleiðis í rakstrar- og løguroknskapin. Løgur, sum eru gjørdar í árinum, verða skrásettar, so skjótt sum upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá goldið verður. Inntøkur av løgum og verkætlanum verða tiknar við sum inntøka, so hvørt sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið, og verða skrásettar so skjótt sum upphæddin kann gerast upp, og í seinasta lagi, tá goldið verður.

## FÍGGJARSTØÐA

### Áogn

Áogn verður virðisásett við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara. Skattaeftirstøður verða upptiknar í fíggjarstøðuni til upprunavirði mótroknað gjørdar avsetingar sambært leiðreglum frá Fíggjamálaráðnum. Broytingar í skattaeftirstøðum verða førdar yvir raksturin undir skattainntøkur.

### Skuld

Langfreistað og stuttfreistað skuld verður upptikin í fíggjarstøðuni til kostprís, tá skuldin verður stovnað. Skuldin verður hereftir upptikin við tí virði, sum hon er niðurgoldin til.

# Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2016

| | Játtan | | | Roknskapur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Rakstur og útlán | | | Rakstur og útlán | | |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | Løgur | Útreiðslur | Inntøkur | Løgur |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **5.037** | **-** | **0** | **4.803** | **-** | **12** |
| 11. Felagsútreiðslur | 5.037 | - | - | 4.803 | - | 12 |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **19.422** | **2.500** | **350** | **19.760** | **2.444** | **359** |
| 20. Heilsumál | 1.699 | - | 350 | 1.673 | - | 359 |
| 21. Almannamál | 17.723 | 2.500 | - | 18.087 | 2.444 | - |
| **§ 3. Børn og ung** | **9.467** | **-** | **0** | **9.812** | **-** | **0** |
| 24. Mentan | 680 | - | - | 771 | - | - |
| 26. Barnaansing | 8.787 | - | - | 9.040 | - | - |
| **§ 4. Undirvísing** | **3.594** | **-** | **300** | **3.731** | **-** | **346** |
| 23. Útbúgving og gransking | 3.594 | - | 300 | 3.731 | - | 346 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **10.145** | **0** | **4.618** | **9.741** | **1** | **4.679** |
| 23. Útbúgving og gransking | 971 | - | - | 844 | - | - |
| 24. Mentan | 9.174 | 0 | 4.618 | 8.897 | 1 | 4.679 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **3.448** | **-** | **2.615** | **3.658** | **-** | **2.493** |
| 11. Felagsútreiðslur | 658 | - | 300 | 491 | - | 292 |
| 22. Íbúðarmál | - | - | - | - | - | - |
| 24. Mentan | 302 | - | - | 274 | - | 35 |
| 30. Umhvørvi | 804 | - | 950 | 500 | - | 492 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 1.684 | - | 1.365 | 2.394 | - | 1.675 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **3.080** | **-** | **685** | **3.263** | **-** | **679** |
| 30. Umhvørvi | 2.530 | - | - | 2.548 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 388 | - | - | 389 | - | - |
| 32. Ráevnisvinna | 90 | - | - | 47 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | 72 | - | 685 | 280 | - | 679 |
| **Tilsamans** | **54.193** | **2.500** | **8.568** | **54.769** | **2.445** | **8.568** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 850 | 0 | - | 711 | - | - |
| § 20. 35. Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 590 | - | - | 505 | - | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | - | 59.288 | - | - | 60.518 | - |
| Tilsamans | 55.633 | 61.788 | 8.568 | 55.984 | 62.963 | 8.568 |
| Yvirskot | - | 6.155 | - | - | 6.979 | - |
| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | - | -2.413 | - | - | -1.589 | - |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | 0 | 995 | - | 5.430 | 5.574 | - |
| **Nettokassaúrslit** | **-** | **-1.418** | **-1.418** | **5.430** | **3.984** | **-1.446** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 2.300 | - | - | 2.773 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **2.300** | **-1.418** | **-3.718** | **8.203** | **3.984** | **-4.219** |
| Fígging: | | | | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 3.718 | - | - | 4.219 | - |
| Fígging íalt: | - | 3.718 | 3.718 | - | 4.219 | 4.219 |
| **Samanlagt** | **2.300** | **2.300** | **-** | **8.203** | **8.203** | **-** |

# Fíggjarstøða við ársenda í 1.000 kr.

| Ogn | 2015 | 2016 |
|---|---|---|
| **Goymslur og áogn** | **4.501** | **6.464** |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 1.143 | 984 |
| Skatta-, toll- o.t. skuldarar | 517 | 814 |
| Skuld hjá stovnum og myndugleikum | 2.898 | 4.678 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | -57 | -10 |
| **Virðisbrøv og tøkur peningur** | **4.071** | **7.538** |
| Banka- og girokontur | 4.053 | 7.520 |
| Kassakontur | 18 | 17 |
| **Ogn tilsamans** | **8.572** | **14.002** |

| Útjavningarkonta og skuld | 2015 | 2016 |
|---|---|---|
| **Útjavningarkonta** | **-32.985** | **-34.575** |
| Salda primo | -39.260 | -32.985 |
| Rakstrar-, løgu og útlánsúrslit | 6.274 | -1.589 |
| **Langfreistað skuld** | **39.350** | **40.796** |
| Innanlandsskuld, vanlig lán | 39.350 | 40.796 |
| **Stuttfreistað skuld** | **2.207** | **7.781** |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 2.371 | 7.822 |
| Skuld, avgjøld | -164 | -29 |
| Onnur stuttfreistað skuld | 0 | -12 |
| **Útjavningarkonta og skuld tilsamans** | **8.572** | **14.002** |

## § 1 Kommunal fyrisiting

| | **Felagsútreiðslur** | Játtan | Roknskapur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **1.11.11.** | **Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 900. | Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 1.425 | 1.479 |
| **1.11.12.** | **Val og valnevndir** | | |
| 900. | Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 85 | 54 |
| **1.11.14.** | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 900. | Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 3.288 | 3.027 |
| 901. | Kommunufyrisitingin (Løguj.) | - | 12 |
| **1.11.21.** | **Kommunufeløg** | | |
| 900. | Kommunufeløg (Stuðulsj.) | 239 | 244 |

## § 2 Almanna- og heilsumál

| | **Heilsumál** | Játtan | Roknskapur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **2.20.21.** | **Ymiskar heilsuútreiðslur** | | |
| 900. | Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 120 | 232 |
| **2.20.22.** | **Kommunulækna- og heilsutænastur** | | |
| 900. | Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 769 | 662 |
| 901. | Kommunulækna- og heilsutænastur (Løguj.) | 350 | 359 |
| **2.20.23.** | **Tannrøkt** | | |
| 900. | Tannrøkt (Rakstrarj.) | 810 | 779 |

| | **Almannamál** | Játtan | Roknskapur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **2.21.13.** | **Ymiskar almannaútreiðslur** | | |
| 900. | Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.000 | 864 |
| **2.21.31.** | **Barnavernd** | | |
| 900. | Barnavernd (Rakstrarj.) | 1.850 | 1.835 |
| **2.21.61.** | **Eldrarøkt** | | |
| 900. | Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 375 | 526 |
| 902. | Eldrasamstarv (Stuðulsj.) | 11.688 | 12.248 |
| **2.21.62.** | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 900. | Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 60 | 22 |
| **2.21.63.** | **Flyting til eldrasamstarv** | | |
| **2.21.72.** | **Forsorg** | | |
| 900. | Forsorg (Stuðulsj.) | 250 | 148 |

## § 3 Børn og ung

| | **Mentan** | Játtan | Roknskapur |
| --- | --- | --- | --- |
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **3.24.12.** | **Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm** | | |
| 900. | Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 680 | 771 |

| | Barnaansing | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **3.26.11.** | **Barnaansing** | | |
| 900. | Barnaansing (Rakstrarj.) | 8.787 | 9.040 |

| | § 4 Undirvísing<br>Útbúgving og gransking | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **4.23.22.** | **Fólkaskúlin** | | |
| 900. | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 3.509 | 3.599 |
| 901. | Fólkaskúlin (Løguj.) | 300 | 346 |
| **4.23.31.** | **Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 900. | Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Stuðulsj.) | 85 | 132 |

| | § 5 Mentan og frítíð<br>Útbúgving og gransking | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **5.23.51.** | **Musikkskúlin** | | |
| 900. | Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 478 | 421 |
| **5.23.52.** | **Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 900. | Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 493 | 424 |

| | Mentan | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **5.24.13.** | **Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð** | | |
| 900. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 249 | 349 |
| **5.24.14.** | **Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 900. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál (Stuðulsj.) | 7.097 | 7.145 |
| **5.24.31.** | **Bókasavn** | | |
| 900. | Bókasavn (Rakstrarj.) | 631 | 627 |
| **5.24.32.** | **Søvn og mentanararvur** | | |
| **5.24.61.** | **Svimjihøllin** | | |
| 900. | Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 70 | 74 |
| **5.24.62.** | **Ítróttaranlegg** | | |
| 900. | Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 1.127 | 701 |
| 901. | Ítróttaranlegg (Løguj.) | 4.618 | 4.679 |

## § 6 Teknisk mál

| Felagsútreiðslur | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 900. Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 218 | 106 |
| 901. Umsiting og røkt av fastognum (Løguj.) | - | 13 |
| **6.11.32. Fríðkan av kommununi** | | |
| 900. Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 363 | 351 |
| 901. Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 300 | 279 |
| **6.11.33. Hegn og bøgarðar** | | |
| 900. Hegn og bøgarðar (Rakstrarj.) | 77 | 33 |

| Mentan | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **6.24.51.** | | |
| 900. Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 302 | 274 |
| 901. Kirkjugarðar (Løguj.) | - | 35 |

| Umhvørvi | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **6.30.21. Vatnveiting** | | |
| 900. Vatnveiting (Rakstrarj.) | 634 | 379 |
| 901. Vatnveiting (Løguj.) | 300 | 273 |
| **6.30.41. Kloakkir** | | |
| 900. Kloakkir (Rakstrarj.) | 170 | 121 |
| 901. Kloakkir (Løguj.) | 650 | 219 |

| Samferðsla og samskifti | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **6.38.11. Vegir** | | |
| 900. Vegir (Rakstrarj.) | 1.269 | 1.858 |
| 901. Vegir (Løguj.) | 1.350 | 1.662 |
| **6.38.12. Gøtuljós** | | |
| 900. Gøtuljós (Rakstrarj.) | 415 | 536 |
| 901. Gøtuljós (Løguj.) | 15 | 13 |
| **6.38.13. Rakstrargøgn** | | |

## § 7 Kommunal virki

| Umhvørvi | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **7.30.42. Renovasjón** | | |
| 900. Renovasjón (Rakstrarj.) | 2.530 | 2.548 |

| Tilbúgving | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **7.31.11. Sløkkiliðið** | | |
| 900. Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 388 | 389 |

| | Ráevnisvinna | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **7.32.31.** | **Grót og mold** | | |
| 900. | Grót og mold (Rakstrarj.) | 90 | 47 |

| | Samferðsla og samskifti | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **7.38.14.** | **Havnir og lendingar** | | |
| 900. | Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -354 | -207 |
| 901. | Havnir og lendingar (Løguj.) | 685 | 679 |
| **7.38.51.** | **Ferðavinna** | | |
| 900. | Kunningarstovan (Rakstrarj.) | 426 | 487 |

## § 20 Inntøkur

| | Íbúðarmál | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **20.22.41.** | **Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 900. | Stuðul til rentuútreiðslur (Stuðulsj.) | 850 | 711 |

| | Rentur | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **20.50.11.** | **Rentuútreiðslur** | | |
| 900. | Rentuútreiðslur (Ógreinað j.) | 590 | 505 |
| **20.50.21.** | **Rentuinntøkur** | | |

| | Skattir og avgjøld | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| | | -------- Tús. kr. -------- | |
| **20.52.11.** | **Kommunuskattur** | | |
| 900. | Kommunuskattur (Ógreinað j.) | -44.000 | -45.040 |
| **20.52.12.** | **Felagsskattur** | | |
| 900. | Felagsskattur (Ógreinað j.) | -1.100 | -1.040 |
| **20.52.13.** | **Skattur av eftirløn** | | |
| **20.52.14.** | **Skattur av eftirlønarinngjøldum** | | |
| 900. | Skattur av eftirlønarinngjøldum (Ógreinað j.) | -9.260 | -9.510 |
| **20.52.39.** | **Aðrar inntøkur** | | |
| **20.52.51.** | **Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir** | | |
| 900. | Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir (Ógreinað j.) | -4.767 | -4.767 |
| **20.52.52.** | **Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið** | | |
| 900. | Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið (Ógreinað j.) | -161 | -161 |

## § 25 Gjaldføri

| Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **25.60.11. Broytingar í virði og skuld v.m.** | | |
| 900. Broytingar í virði og skuld v.m. (Ógreinað j.) | -995 | -143 |

| Afturgjald av skuld | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **25.62.11. Afturgjald av skuld** | | |
| 900. Afturgjald av skuld (Ógreinað j.) | 2.300 | 2.773 |

| Útvegan av gjaldføri | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| | -------- Tús. kr. -------- | |
| **25.64.11. Útvegan av gjaldføri** | | |
| 900. Útvegan av gjaldføri (Ógreinað j.) | -3.718 | -4.219 |